Høgni Hoydal um løgmansrøðuna:

# Ein politisk svada



**Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum, er als ikki nøgdur við røðuna hjá løgmanni. – Í síni heild var løgmansrøðan ein politisk svada, sum minnir um ein motor í tómgongd, heldur hann**

*Vit hava eina breiða samgongu við nógvum fólkum, sum áttu at kunnað útint okkurt. Men samgongan minnir meg tíverri heldur um nakrar setningar úr Sildavalsinum. Tí í samgonguni er bert rumbul og eingin kós, men stúgvandi fult eins og sild í dós.*

- Høgni Hoydal

LØGMANSRØÐAN
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

– Í løgmansrøðuni var eingin nýggjur tanki og ongar visjónir yvirhøvur, hóast løgmaður hevur prátað dúgliga um visjónir seinastu nógvu mánaðirnar. Júst hetta prógvar, at embætisfólk ikki skulu gera visjónir, men at politikarar sjálvir skulu hava visjónir, sigur Høgni Hoydal og smæðist ikki burtur við at staðfesta, at núverandi samgongan als ikki hevur eina kós:

– Vit hava eina breiða samgongu við nógvum fólkum, sum áttu at kunnað útint okkurt. Men samgongan minnir meg tíverri heldur um nakrar setningar úr Sildavalsinum. Tí í samgonguni er bert rumbul og eingin kós, men stúgvandi fult eins og sild í dós.

– Eg sakni ein leist, sum kann seta fullveldi, rættartrygd og samhaldsfasti aftur á dagsskránna. Tað, sum løgmaður kom við í røðu síni, eru bert leysir tankar, sum hann hevur hoyrt onkran annan siga. Eitt nú sigur hann í innganginum, at tað gongur væl í Føroyum. Tað er slíkt, sum Anders Fogh Rasmussen plagar at siga. Og so nevndi løgmaður eitt sindur um familjupolitikk – nú skulu øll hava tað gott, tey gomlu og tey ungu... Hetta minnir meg um útsagnir, sum verða brúktar, tá flokkar fara á val, heldur Høgni Hoydal og skoytir uppí, at løgmansrøðan bar á brá, at tað skjótt verður val:

– Tað er einki at ivast í, at løgmaður ikki trýr upp á tað, sum hann sjálvur segði í røðuni. Hann var ófyrireikaður, tí hann hevur ongar visjónir. Hjá honum snýr tað seg í løtuni bara um at verða sitandi, og at alt skal ljóða væl, sigur Høgni og leggur at enda afturat, at tað er undarligt, at løgmaður er sloppin avstað við øllum sínum hugleiðingum um visjónir:

– Tær eru so sera úrtøkiligar, og eingin veit, hvat tær snúgva seg um. Hann biður embætisfólk orða sær eina visjón, tí hann manglar eina. Men har er eingin visjón at hóma nakrastaðni.

---

# Einaferð mugu greiðar útmeldingar koma

**Kári P. Højgaard saknar greiðar útmeldingar frá løgmanni í røðu hansara, og heldur at hann fer alt ov lætt um keyp og sølu av fiskiloyvum. - Tað er ein vanlukka, at vit noyðast at bíða so longi áðrenn nakað hendir, sigur formaður Sjálvstýrisfloksins, sum finst at nógvum í røðu løgamans, men eisini hevur okkurt gott at bera henni**

LØGMANSRØÐAN
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Formaður Sjálvstýrisfloksins, Kári P. Højgaard, finst at nógvum í røðu løgmans á ólavsøku, men hann hevur eisini rósandi orð at bera henni. Eitt nú fegnast hann um bústaðarpakkan:

- Øll tiltøk, sum kunnu økja um møguleikan at fáa tak yvir høvdið fyri ein rímiligan pening hevur allan stuðul uppibornan og tað taki eg fult undir við, vísir Kári P. Højgaard á.

Annars heldur Kári P. Højgaard, at røðan var ov lítið ítøkilig:

- Hetta triðja røða løgmans, og nú roknaði mann so við, at hann fór at koma við greiðum uppskotum, sum mann síðani ætlaði at gjøgnumføra, men so var ikki, heldur Kári P. Højgaard.

Hann hevði eitt nú væntað, at løgmaður fór at koma nærri inn á, hvussu og hvat skal gerast við tað, sum hendir innan fiskivinnuna í dag.

- Løgmaður sigur í røðuni, at keyp og søla ikki er nakað nýtt. Hetta eri eg als ikki samdur í, tí tað, sum hendir í dag er fullkomiliga kollveltandi, at ein so stórur partur av flotanum skiftir eigara og savnast í so stórum eindum sum talan er um. Tað er eindømi, sigur Kári P. Højgaard, sum heldur áfram:

- Tá so ein løgfrøðingur sum hevur í fiskimálaráðnum sigur, at hetta kann broytast við at skoyta tvær linjur upp í verandi løggávu um vinnuligan fiskiskap, so er tað fyri mær óskiljandi at tað skal taka so langa tíð, og at mann skal bíða so longi so, at allir handlarnir er avgreiddir áðrenn mann fær hetta her upp í lag. Tað er onki minni enn ein vanlukka, staðfestir Kári P. Højgaard.

Formaður Sjálvstýrisfloksins er heldur ikki samdur í, at pensjónir í næstum fara at hækka, tí tað er ikki talan um eina pensjónshækking, heldur hann:



- Tað er bara ein máti at hækka pensjónirnar, og tað er við at hækka grundupphæddina ella at hækka viðbøturnar. Hitt er eitt ískoyti til pensjónirnar, sum er eitt arbeiðsmarknaðargjald, sum arbeiðsmarknaðurin rindar burturav.

Kári P. Højgaard finst eisini at Visjón 2015-ætlanunum:

- Tað fyrikemur mær púra øvugt, at tú í dag setir embætisfólk at koma við hugskotum, sum politiska skipanin síðani skal góðtaka. Áður vóru tað flokkarnir, sum greiddu frá sínum visjónum og síðani var tað embætisfólkið, sum førdi tað út í lívið, heldur Kári P. Højgaard.

Sum eina síðsu viðmerking hevur formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum hug at tríva í umrøðu løgmans av góðu samfelagsgongdini.

- Vit kunnu bara fegnast um, at tað gongur so væl í Føroyum, sum tað ger í dag. Men vit eiga at síggja tað sum okkara skyldu at greina hví tað gongur so væl sum tað ger, og her hugsi eg serliga um áðurnevndu vandamál, har tað er lættari at fáa fatur í pengum orsaka av lánum. Um so er, at tað er veruleikin, so eiga vit at vera sera varin, og tá ber ikki til at oysa pengar út í endanum á einum valskeiði upp á tað, at rokningin fellur í næsta valskeiði, sigur Kári P. Højgaard at enda.